# Skálaberg fer at framleiða til mikrobylgjuovnar

**Eftir at skipið hevur verið fyrsta túrin í Irmingarhavinum, verða maskinur nú settar umborð, sum kunnu framleiða lidnar fiskavørur, klárar at seta í mikrobylgjuovnin. – Vit kunnu saktans "hølva" útlendsku vørurnar av í dygd, sigur Hanus Hansen, reiðari**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Teir pakka kongafisk umborð á Skálabergi. Annar frystarin virkaði ikki optimalt á hesum fyrsta túrinum, men annars royndist skipið og høvuðsútgerðin umborð til fulnar.*

*Mynd: Hans Pauli við Misá*

Nýggi trolarin hjá JFK-Troli, Skálaberg, hevur verið sín fyrsta túr á kongafiskaveiði í Irmingarhavinum.

Reiðarin, Hanus Hansen, sigur, at skipið royndist ógvuliga væl og allir, hann hevur tosað við eftir henda fyrsta túrin, lata væl at.

- Teir siga, at skipið fer væl við sær í sjónum, og tað er gott at vera umborð. Vit eru væl nøgdir við hesa fyrstu royndina, tí alt bendir á, at hetta er eitt ógvuliga gott skip.

- Høvuðsútgerðin, motoror og spøl, riggaðu til fulnar, og tað gjørdi meginparturin av útgerðini annars eisini.

## Frystingin umvælast

Reiðarin vísir á, at Skálaberg hevur sjálvvirkandi frysting, sum tað verður rópt, og her riggaði annar frystarin ikki optimalt.

- Skipanin við hesi frysting er, at tá ið ein ramma er liðugt pakkað, fer vøran sjálvvirkandi gjøgnum alla skipanina.

Hanus sigur, at veiðan í Irmingarhavinum var rímiliga góð, men hetta er smáur kongafiskur, sum krevur nógva orku, bæði av fólki og útgerð.

- Kanska mistu vit eitt sindur við tað, at annar frystarin ikki var optimalur hendan túrin. Nú skipið liggur á Klaksvík, verður frystarin umvældur.

Tá ið vit tosaðu við Hanus mikumorgunin, hevði Skálaberg ikki landað.

## Góðsking

Leygardagin ella mánadagin komandi fer Skálaberg nýggjan túr.

Men áðrenn farið verður eystureftir, verður útgerð sett umborð til framleiðslu og smápakking av portiónsvørum.

- Vit fara at gera tað, vit kunnu, fyri at fáa sum mest fyri fiskin, sum kemur inn á dekkið.

Hanus sigur, at tvær maskinur aftrat verða settar upp umborð. Hetta eru somu maskinur, sum virkini á landi brúka til framleiðslu av portiónum og lidnum rættum til mikrobylgjuovnar.

Spurdur, hvar meirvirkaða framleiðslan verður seld, sigur reiðarin, at hon fer eitt nú til Onglands, Danmarkar, Týsklands og Fraklands.

## 10 kr. meira

- Málið við nýggju maskinunum er at meirvirka ein part av tí rávøru, sum púra fesk kemur inn á dekkið. Eingin sigur, at hetta er nøkur løtt uppgáva, hóast vit hava feskasta fiskin, maskinurnar og fólkið við hondina. Tað hevði ivaleyst verið lættari bara at fylt skipið við traditionellum flaki. Men vit trúgva, at her eru møguleikar, sum ikki verður gjørt nóg nógv við.

Hanus sigur, at teir fara at royna at fáa ein betri prís fyri lastina, sum skipið hevur, tá ið landað verður. Men tað fer at taka tíð at byggja upp ein nýggjan marknað.

- Eg vænti, tað fara at ganga eitt ella tvey ár, áðrenn vit kunnu siga, at vit fáa 10 krónur meira fyri kilo. Men kósin er sett fram ímóti hesum, leggur hann aftrat.

## Betri vøra

Hanus sigur, at tá ið hann hevur verið uttanlands, hevur hann stundum keypt lidnar vørum, sum eru framleiddar uppi á landi til mikrobylgjuovnar.

*- Vit hava keypt slíkar fiskavørur, hava pakkað tær út og hugt at teimum. Einki er at ivast í, at vit kunnu "hølva" hesar vørur av í dygd, tí okkara fiskur er nógv feskari enn tann, hesar vørur eru framleiddar úr. Men fyri tann skuld verður hetta ikki lætt, tí marknaðarføring er ein so stórur partur av øllum hesum, sigur reiðarin, Hanus Hansen á JKF-Troli, at enda.*



*Skálaberg hevur verið sín fyrsta túr á kongafiskaveiði í Irmingarhavinum. Her hava teir júst hálað, eini 50 tons av kongafiski eru í posanum.*

*Mynd: Hans Pauli við Misá*



# Løgreglan tók ikki drápshóttan ímóti løgtingsmanni í álvara

**Jenis av Rana heldur ikki, at løgreglan gjørdi nóg mikið fyri at uppklára málið eftir at hann hevði fingið eina eina beinleiðis drápshóttan**

DRÁPSHÓTTAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Eg skilji ikki løgregluarbeiði avhesum slagnum, tí talan var um eina beinleiðis drápshóttan ímóti mær og øllum mínum húski, sigur Jenis av Rana, løgtingsmaður*

Jenis av Rana er ein skelkaður maður.

Skelkaður, tí nakað síðani varð hann hóttur við lívinum.

Tað er ein álvarsligur skelkur í sær sjálvum.

Men líka stórur skelkur er tað, at hann situr eftir við eini kenslu av, at løgreglan ikki hevur gjørt nóg mikið fyri at uppklára málið.

Út ímóti jólum í fjør skrivaðu vit um, at postkassin hjá løgtingsmanninum fyri miðflokkin varð sprongdur í luftina eitt kvøldið.

Eftir tað byrjaði ein sonn herferð ímóti Jenisi av Rana.

– Aftaná at postkassin varð sprongdur í luftina, fekk eg eina røð av sms boðum, har hann beinleiðis varð hóttur við lívinum. Grovastu boðini fekk eg frá einum, sum í einum ógvuliga óhugnaligum orðavali skrivaði, at hetta við postkassanum var bara byrjanin og at næstu ferð skuldi øll húsini sprongjast í luftina og at bæði eg og alt húskið skuldi lata lív.

Jenis av Rana sigur, at hann meldaði málið til løgregluna, men hann heldur ikki, at løgreglan gjørdi nóg mikið fyri at loysa málið.

Jenis av Rana sigur, at tað vísti seg, at sms boðini vórðu send av eini teldu á einum almennum stovni.

– Tað einasta, sum løgreglan gjørdi fyri at finna útav, hvør sendi teldupostin, var at hon spurdi stovnsleiðsluna um hon kendi nakað til hendingina. Men tá ið leiðslan segði, at hon hevði ongan nøguleika at finna fram til, sendi sms-boðini á telduni, legði løgreglan málið til viks og gjørdi ikki meiri við tað.

Løgtingsmaðurin sigur, at hetta vóru boðini, hann fekk frá løgregluni.

– Hetta gjørdi løgreglan, hóast hon visti, hvaðani boðini vórðu send og at hon eisini visti upp á minuttin, nær sms boðini vórðu send.

## Illa vard

Jenis av Rana heldur, at hetta vísur, hvussu illa vard vit í veruleikanum eru, hóast vit siga okkum liva í einum framkomnum samfelag.

– Eg má siga, at eg haldi ikki, at hetta er serliga sannførandi løgregluarbeiði og eg skilji ikki løgregluarbeiði av hesum slagi. Skal uppkláringararbeiðið verða á síkum støði, kundi eg akkurát tað sama sjálvur farið undir arbeiðið at funnið útav, hvør tað var.

Løgtingsmaðurin heldur, at stovnsleiðslan á hesum almenna stovninum heilt einfalt átti at fingið álagt at funnið útav, hvør sendi sms-boðini og hann hevði eisini væntað, at løgreglan fór at leggja størri orku enn hon gjørdi í royndina at finna útav, hvør sendarin var.

– Tað hevur skelkað bæði meg og alt húskið, at vit skulu vera so illa vard og eg haldi, at hetta var sera jánkasligt av løgregluni.

Jenis av Rana sigur, at nakað síðani skrivaði hann aftur til løgregluna og boðaði frá síni misnøgd.

Hann heitti eisini á løgregluna um at taka málið uppaftur.

Hetta eru nú nakrir mánaðir síðani, men enn hevur hann onki hoyrt aftur frá løgregluni.

Hann sigur, at hann alla tíðina hevur merkt ein illvilja frá løgregluni at kanna málið.

– Tá ið postkassin varð sprongdur í luftina var løgreglan einki fyri at kanna málið yvirhøvur. Tað var ikki fyrrenn fjølmiðlarnir umrøddu hendingina, at kanningar vórðu settar í verk, sigur Jenis av Rana. Hann sigur eisini, at eftir hansara tykki hevur løgreglan gjørt alt ov lítið fyri at fáa greiði á málinum og fyri at finna tann, sum sendi drápsháttanina.

Og hann leggur afturat, at hann tískil rætt og slætt hevur mist alt álitið á løgregluni.

– Fyri meg var hetta alt annað enn skemt, tí hetta var ein beinleiðis drápshóttan ímóti mær og øllum mínum húski og tað taki eg í størsta álvara.

– Og tað ber ikki til í einum framkomnum samfelag, at tað skal kunna fara aftur við borðinum so lætt. Hann leggur kortini afturat, at síðani málið kom alment fram í fjølmiðlunum har tað varð upplýst, at løgreglan arbeiddi við málinum, hevur verið friður.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá løgregluni, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Kolonipoppur á toppinum

**Guðrun Sólja Jacobsen streyk inn sum nummar 2 á almenna danska hitlistanum hesa vikuna. Eisini grønlendska Julie liggur ovarliga, og hetta fær Ekstrablaðið at skriva, at kolonipoppur er sakin**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nú er nýggja fløgan hjá Guðrun Sólju Jacobsen komin á almenna danska hitlistan fyri fløguútgávur.

Hesa vikuna streyk »Quiet Storm« beinleiðis inn sum nummar 2 á listanum, sum samtakið fyri plátufeløg, IFPI, og AC Nielsen AIM gera. Listin byggir á plátusøluna á danska marknaðinum.

Fleiri høvdu roknað við, at Guðrun longu fyrstu vikuna fór at leggja seg á ovasta plássið, men hon mátti lúta fyri rockbólkinum Big Fat Snake, sum situr omaná øllum hinum hesa vikuna.

## Kolonipoppur

Ummælararnir á donsku bløðunum hava ikki givið fløguni hjá Guðruni nakað serligt skoðsmál, men hetta hevur ikki forðað dønum í at keypa túsundtals fløgur hjá henni.

Nú koyrir eisini ein sjónvarpslýsing á donskum rásum, og tað fer uttan iva at hava við sær góða sølu.

Danska Ekstrablaðið skrivaði í vikuni, at tað eru tær fyrrverandi donsku koloniirnar, sum herseta toppin á danska tónatindinum í hesum døgum.

Umframt Guðrun hevur grønlendska Julie, sum var við í PopStars kappingini, leingi ligið ovarliga á danska hitlistanum. Hon hevur verið nummar 1, men er í løtuni nummar 5.

## Avkastið

– Kolonipoppur er sakin, skrivar Ekstrablaðið í einum skemtandi tóna, men blaðið heldur, at tað er einki eksotiskt ella serligt við tónleikinum hjá Guðrun og Julie.

– Tað er popptónleikur í meturmáli, og tað tykist, sum hann er gjørdur út frá eini atkvøðugreiðslu millum partaeigararnar í plátufelagnum við størst møguliga avkastinum fyri minst møguliga avrik fyri eyga, skrivar Ekstrablaðið.

Tað er ikki bert í Danmark, at Guðrun hevur góða sølu, tí í Føroyum fóru eini 1000 eintøk av fløguni um handilsdiskin fyrstu vikuna.